# 39 fosturtøkur í Føroyum í fjør

- Í fjør vóru 39 fosturtøkur í Føroyum.

Hetta vísir ein uppgerð, sum heilsumyndugleikarnir hava gjørt til landsstýrismannin í heilsumálum.

Hetta eru 12 fosturtøkur færri enn í 2009, tá ið 51 fosturtøkur vóru í Føroyum.

Jenis av Rana, tingmaður fyri Miðflokkin, hevur spurt landsstýrismannin í heilsumálum um fosturtøkur.

Hann heldur, at talið á fosturtøkum er alt ov høgt og at gongdin er kanska enntá, at fleiri og fleiri fosturtøkur verða framdar.

Hesum er Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, ikki samdur í.

Hann sigur, at upp ígjøgnum nítiárini var talið á fosturtøkum í Føroyum lutfalsliga høgt, tí tá lá tað sum heild ímillum 50 og 60 fosturtøkur um árið, men so tók tað at minka.

Men taka vit alt tíðarskeiðið frá 1994 til í dag undir einum, er gongdin tann, at talið á fosturtøkum lækkar.

Í miðal hava 47 fosturtøkur verið í Føroyum hesi árini frá 1994 til í dag.

Annars vísir hann á, at í 1997 fingu vit ráðgevingina, ið nevnist Sjálvhjálpin og síðani er talið á fosturtøkum minkað.



Hesi seinastu trý árini hevur talið á fosturtøkum verið 42 í miðal, men árini frammanundan var miðaltalið 46 fosturtøkur um árið.

Sostatt hevur løggávan ikki alt at siga um talið á fosturtøkum hækkar ella lækkar, heldur hann.

Hann sigur, at onnur viðurskifti, sum gera seg galdandi, eru tær sosialu skipanirnar, sum eru settar í gildi og sum hjálpa teimum, sum koma illa fyri.

### Órættvís mynd

Hinvegin kann eisini staðfestast, at tað eru mong í Løgtinginum, sum ikki eru so vís í, at almennu tølini vísa eina rættvísa mynd av, hvussu fosturtøkur í veruleikanum eru í Føroyum.

Tey vísa á, at fosturtøkulógin er so mikið avmarkandi, at tað er ikki óvanligt, at føroyskar kvinnur fara til Danmarkar at fáa fosturtøku og tí er tað ongin, sum veruliga veit, hvussu høgt talið í Føroyum er.

Tey vísa á, at fyri at serligar orsøkir skulu til fyri at fáa fosturtøku í Føroyum og tí rópa kvinnur seg upp á ymsar sálarligar ella sosialar trupulleikar fyri at fáa læknan at góðtaka, at fostrið kann takast.

Tað merkir so eisini, at tað verður viðmerkt í sjúkradagbókini hjá kvinnuni, at hon hevur trupulleikar og onkusvegna ikki er før fyri at hava eitt barn, uttan at hetta neyðturvuliga er so og hendan viðmerkingin í sjúkradagbókini forfylgir so kvinnuni alt lívið.

Aksel V. Johannesen sigur, at veruleikin er ongin veit hetta við vissu, tí tað verður ikki skrásett nakrastaðni

- Tølini, sum landsstýrismaðurin vartar upp við, er eitt skuggatal, tí eg veit, at tað eru kvinnur, sum fara uttanlands at fáa fosturtøku, staðfestir Bjørt Samuelsen, løgtingskvinna fyri Tjóðveldi.

**FÆRRI FOSTURTØKUR**

*Hesi seinastu árini er talið á fosturtøkum sum heild verið fallandi, sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, men tað skilst eisini, at ongar ætlanir eru um at broyta lógina*

## Talið fellur

**Hesi seinastu árini hevur talið á fosturtøkum í Føroyum verið:**

| | |
|---|---|
| **1994:** | 57 |
| **1995:** | 59 |
| **1996:** | 58 |
| **1997:** | 38 |
| **1998:** | 59 |
| - - - - - - | |
| **2005:** | 29 |
| **2006:** | 41 |
| **2007:** | 46 |
| **2008:** | 37 |
| **2009:** | 51 |
| **2010:** | 39 |

# Ósemja um at broyta lógina um fosturtøku

Skal lógin um fosturtøku í Føroyum broytast, má málsøkið fyrst yvirtakast frá dønum.

Tað staðfestir Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum.

Av tí, at fosturtøkulógin er danskt málsøki, hava vit sostatt ikki heimild at broyta hana í Føroyum, hóast vit vilja, leggur hann afturat.

- Antin má málsøkið yvirtakast, ella má Løgtingið samtykkja at heita á danska Fólkatingið, um at gera ávísar broytingar.

Annars vísir hann á, at í Løgtinginum verður tað tørført at semjast um nakrar broytingar.

Ein partur av tinglimum, bæði í samgongu og andstøðuni, vilja herða lógina og ein annar partur, bæði í samgongu og í andstøðu, vilja hava eina frælsari fosturtøkulóg.

### Má broytast

Jenis av Rana er ein tinglimur, sum heldur, at lógin er so gomul, at hon eigur at verða broytt.

Men hann vil ikki vera við, at hann vil hava hana strangari.

Hinvegin heldur hann, at vit mugu koma burtur úr teirri støðu, vit nú eru í, har tað eru tvær læknar, altso kommunulæknin og læknin, sum fremur fosturtøkuna, sum gera av um ein kvinna kann fáa fosturtøku ella ikki.

Hann vísir á, at í Danmark stendur tað øllum kvinnum frítt at fáa fosturtøku fyri 12, viku, men eftir 12, viku skal hon til samráð hjá serkønari nevnd.

Hann heldur, at tað skuldi altíð verið galdandi í Føroyum, so vit fingu eina nevnd, sum minnur um ta donsku Mødrehjælpen.

- Tað mugu ongantíð verða sosialir trupulleikar, sum eru orsøkin til at ein kvinna vil hava fosturtøku.

- Er talan um sosialar trupulleikar, skulu teir loysast, so at tað ikki verður ein grundgeving fyri at fáa fosturtøku.

Hinvegin vísa aðrir løgtingslimir á, at vit mugu ansa serstakliga væl eftir at vit ikki gera lógina ov avmarkandi, tí tað fer at birta upp undir ólógligar fosturtøkur.

Tað er vælkent aðrastaðni og tað er eisini vælkent, at tað kostar nógvum kvinnum lív og heilsu og eina slíka støðu mugu vit ikki koma okkum í Føroyum í.

## Sera fáar fostur-tøkur

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálumm, staðfestir, at í Føroyum eru serstakliga fáar fosturtøkur afturímóti hinum norðanlondunum.

Hann sigur, at frá 1994 til nú, hevur talið talið á fosturtøkum í Føroyum verið 5-7% av øllum barnsburðunum í hesum tíðarskeiði.

| | |
|---|---|
| **Í Danmark er talið** | **23-25%** |
| **Í Finnlandi er talið** | **18-19%** |
| **Í Álandi er tað** | **22-27%** |
| **Í Íslandi er tað** | **19-22%** |
| **Í Noregi er tað** | **25-26%** |
| **Í Svøríki er tað** | **34-35%** |

Og í Grønlandi eru fosturtøkurnar heilt upp ímóti 50% av øllum barnsburðunum